# Sáttmáli

# millum

# Starvsfelagið

# og

# Fíggjarmálaráðið

# 2024 - 2025

1. Kapittul. Alment ..... 5
§ 1 Sáttmálaøki og samráðingarrættur ..... 5
§ 2 Arbeiðspláss og broytingar í arbeiðsgongd o.a. ..... 5
§ 3 Álitisfólk og nevndarlimir ..... 5
§ 4 Setan ..... 6
§ 5 Fyribilsstørv og avloysarar ..... 6
§ 6 Uppsøgn ..... 7
§ 7 Sjúka ..... 7
§ 8 Barnsferð ..... 8
§ 9 Eftirsitiløn ..... 8
§ 10 Frítíð ..... 8
§ 11 Farloyvi ..... 9
§ 12 Fyribils tænasta í hægri starvi ..... 9
§ 13 Eftirlønartrygging ..... 9
§ 14 Tænastuferðir og koyripeningur ..... 9
§ 15 Stovnsleiðarar ..... 9
§ 16 Aðrar skipanartreytir ..... 10
§ 17 Onnur viðurskifti ..... 10
2. Kapittul. Arbeiðstíð ..... 10
§ 18 Arbeiðstíðin ..... 10
§ 19 Matarsteðgur ..... 10
§ 20 Arbeiði skipað í vaktum ..... 10
§ 21 Arbeiði í ólagaligum tíðarskeiðum ..... 10
§ 22 Yvirarbeiði ..... 11
§ 23 Meirarbeiði ..... 11
§ 24 Sjálvboðið eyka arbeiði ..... 12
§ 25 Tilkallivakt ..... 12
§ 26 Fastir frídagar ..... 12
§ 27 Gjald ella avspákan ..... 12
§ 28 Samsýning fyri skeiðluttøku ..... 12
§ 29 Frí við ongari løn ..... 13
3. Kapittul. Um løn og at flokka størv ..... 13
§ 30 At flokka ..... 13
§ 31 Lønaraldur ..... 13
§ 32 Løn ..... 13
§ 33 Tímaløn ..... 14
§ 34 Viðbøtur ..... 14
§ 35 Næmingar ..... 14
§ 36 Praktikantar ..... 14
§ 37 Starvsmetingarnevnd ..... 14
4. Kapittul. Sjófólk ..... 14
Heilsuváttan ..... 13
4.1. Fiskiveiðueftirlitið ..... 15
§ 38 Arbeiðstíð ..... 15
§ 39 Flokkan og starvsaldur ..... 15
§ 40 Yvirtíðarlønir ..... 15
§ 41 Bjarging o.a. ..... 15
4.2. Havstovan ..... 16

§ 42 Arbeiðstíð....16
§ 43 Flokkan og starvsaldur....16
§ 44 Yvirtíðarlønir....16
§ 45 Avtala um, arbeiði umborð á Jákup Sverra....17
4.3. Strandfaraskip Landsins....17
§ 46. Arbeiðstíð....17
§ 47. Arbeiðsætlan....18
§ 48. Feria og onnur frítíð....18
§ 49. Tímaløn....18
§ 50. Meirarbeiði og avspákan....18
§ 51. Meirarbeiðsviðbót....18
§ 52. Tilkallivakt....19
§ 53. Kostpeningur hjá sjófólkum Strandfaraskipum Landsins....19
§ 54. Skeið....19
§ 55. Flokkanir....19
§ 56 Fastir avloystarar hjá Strandfaraskip Landsins....19
§ 57 Fyribils tænasta í hægri starvi....20
§ 58. Fylgibólkur....20
5. Kapittul. Sjúkraflutingstænastan....20
§ 59. Arbeiðstíð/yvirarbeiði/frídagar....20
§ 60. Tilkallivakt....21
§ 61. Vaktargjald....21
§ 62. Sektiónir v.m....22
§ 63. Flokkingar....23
6. Kapittul. Gildi sáttmálans....22
§ 64 Gildi sáttmálans....22
Fylgiskjal um flokkan og lønir....23
1. Endamál....23
2. Alment um flokkanarfyrilit....23
3. Útbúgvingarkrøv og arbeiðsroyndir....23
Flokkur I....23
Flokkur II....23
Flokkur III....23
Flokkur IV....23
Flokkur V....23
Flokkur VI....24
4. Starvsinnihald....24
Flokkur III....24
Flokkur IV og V....24
Flokkur VI....24
Flokkur VII....24
Flokkur VIII....24
5. Serfrøðingar....24
6. Miðallangar útbúgvingar....26
7. Leiðsla....26
8. Edv-leiðarastørv....25
Rúmligi arbeiðsmarknaðurin....27
Protokollat viðv. Lønartalvuni....27

Sjúrkaflutinginstænastan - protokollat um arbeiðstíðaravtaluna……………………………………27
Protokollat um felags evnisdag um førleikamenning ………………………………………………27
Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum............29
Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins ........................................301
Ískoytisavtala til avtalu um førleikamenning………………………………………………………… 31
Avtala um serstaka fríviku.......................................................................................................323
Ískoytisavtala um gott og mennandi arbeiðsumhvørvi……………….……………………………….34
Avtala um fráboðanarfreist og fráboðanarform………………………..……………………………...35
Avtala um neyðtilbúgving ……………………………………………………………………………….35
Yvirlit yvir tal av álitisfólkum á almennum stovnum…………….……….…………………………..37

# 1. Kapittul. Alment

**§ 1 Sáttmálaøki og samráðingarrættur**
Hesin sáttmáli fevnir um starvsfólk í landsins tænastu, sum eru ikki tænastumenn ella nú verða lønt eftir øðrum lønarskipanum. Sáttmálin fevnir um tey størv, sum flokkað eru sambært § 30.
*Stk. 2.* Í sáttmálaskeiðinum mugu ikki verða gjørdir aðrir lønarsáttmálar um tey arbeiðsøki, ið hesin sáttmáli umfatar, uttan at semja fyrst er fingin um hetta millum Starvsfelagið og hin fakfelagsskapin, ið sáttmáli er ætlaður gjørdur við.
*Stk. 3.* Viðvíkjandi samráðingarrættinum verður víst til løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn við møguligum seinri broytingum.
*Stk. 4.* Er sáttmálin uppsagdur, og semja ikki kemur í lag partanna millum, ella annar parturin ber seg undan tingingum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingarnar framdar við at semingsstovninum, vísandi til Løgtingslóg nr. 39 frá 13. mai 2013. Sí eisini avtalu um fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi.
*Stk. 5.* Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarættin.

**§ 2 Arbeiðspláss og broytingar í arbeiðsgongd o.a.**
Tá ið avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættaleggingini. Krevja tílík tiltøk eftirútbúgving, skulu starvsfólkini hava høvi til at fáa neyðuga eftirútbúgving, so tey kunnu røkja hesi arbeiði.
*Stk. 2.* Álitisfólkið skal hava skipanarreglur (organisatiónsskipan/starvslýsingar) fyri viðkomandi stovn, eins og álitisfólkini skulu takast við í ráðleggingina, tá ið broytingar verða gjørdar sbrt. stk. 1.
*Stk. 3.* Á øllum almennum stovnum verður sett ein samstarvsnevnd, har leiðsla, álitisfólk og varaálitisfólk sita, sum skal hava innlit í øll viðurskifti, sum hava við stovnin og uppgávur hansara at gera. Leiðslan søkir sær ráð hjá samstarvsnevndini, áðrenn avgerðir verða tiknar.

**§ 3 Álitisfólk og nevndarlimir**
Tá ið tað á einum stovni/deild starvast í minsta lagi 5 limir í Starvsfelagnum, hava hesir limir rætt at velja eitt álitisfólk, víst verður til yvirlit aftast í sáttmálanum yvir, hvussu nógv álitisfólk verða vald á hvørjum stovni. Álitisfólk og nevndarlimir kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.
*Stk. 2.* Til álitisfólk kann bara veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi deildini í minsta lagi í 1 ár, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum. Tá ið ein er valdur til álitisfólk, fær ein samsýning svarandi til eitt lønarstig.
*Stk. 3.* Lærlingar kunnu ikki veljast til álitisfólk.
*Stk. 4.* Valið hevur ikki gildi, fyrr enn Starvsfelagið hevur góðkent tað og boðað leiðsluni á avvarðandi stovni frá. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.
*Stk. 5.* Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.
*Stk. 6.* Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum hava týdning fyri starvsfólkið og stovnin. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri felagið.
*Stk. 7.* Tá ið talan er um at flyta ella siga upp starvsfólk, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi deild. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.
*Stk. 8.* Tá ið talan er um at seta starvsfólk, skal álitisfólkið hava málið til ummælis, áðrenn endalig støða verður tikin.

*Stk. 9.* Álitisfólkið skal í samráð við stovnin í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftunum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.
*Stk. 10.* Um starvsfólk er valt í nevnd felagsins, skal tí verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Harumframt fáa nevndarlimir frí við løn 1 dag um mánaðin til felagsarbeiði.
*Stk. 11.* Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti.
*Stk. 12.* Tá ið álitisfólk og starvsfólk søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið, fer Fíggjarmálaráðið at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í felagnum.

> *Protokollat viðv. reglugerð fyri álitisfólk*
> *Partarnir eru samdir um, at álitisfólk skulu hava rætt til at koma saman til felagsfund 2 ferðir um árið í arbeiðstíðini.*

**§ 4 Setan**
Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys á stovninum og alment. Er tó ikki neyðugt at lýsa starvið leyst, um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir. Leiðslan kann í einstøkum føri, í samráð við álitisfólkini loyva, at starv bara verður lýst innanhýsis, millum tey starvsfólk, sum frammanundan eru í føstum starvi. Tilskilast skal, hvat starvið umfatar, hvør útbúgving krevst, og hvørjum sáttmála og lønarflokki starvið verður lønt eftir. Sama er galdandi, tá ið lýst verður eftir fyribilshjálp o.ø. Er talan um nýtt starv, sum ikki higartil er flokkað, skal Fíggjarmálaráðið samráðast við felagið um lønarflokk, áðrenn starvið verður lýst leyst, smbr. § 37 um starvsmetingarnevnd í sáttmálanum um lønir og at flokka størv.
*Stk. 2.* Tá ið starvið er sett, skal hann, ið starvið hevur fingið í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fáa setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við,
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. bólking,
6. eftirlønargjald
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og tí setta,
9. arbeiðstíð,
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti,
11. setanarøki
12. arbeiðstaður/staðir.

*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Starvsfelagnum.
*Stk. 4.* Limagjald til Starvsfelagið kann verða frádrigið í lønarútgjaldingini.

**§ 5 Fyribilsstørv og avloysarar**
Sum fyribilsarbeiði er at skilja arbeiði, sum ikki varir longur enn í mesta lagi 6 mánaðir í einum ári. Verður arbeitt meira, er talan um vanligt starv við vanligari uppsagnarfreist frá fyrsta starvsdegi.

*Stk. 2.* Sum avloysari er at skilja starvsfólk, sum arbeiðir fyri annað navngivið starvsfólk, sum vegna sjúku, barnsburð ella farloyvi ikki er í starvi. Er ikki tilskilað í setanarbrævi í sambandi við avloysing, hvønn viðkomandi avloysir, er starvið at meta sum vanligt starv við vanligari uppsagnarfreist frá fyrsta starvsdegi.
*Stk. 3.* Avtalur um fyribilsstørv, avloysarar og onnur størv, ið eru avmarkað í tíð, skulu vera nágreiniliga og skrivligar. Avtalur skulu vera gjørdar við starvsfólkið áðrenn setanin byrjar.
*Stk. 4.* Frávik frá hesum reglum kunnu bara góðtakast við góðkenning frá Starvsfelagnum.
*Stk. 5.* Fyribilshjálp og avloysarar fáa yvirtíðarløn og eykasamsýningar eftir reglunum í § 22.

**§ 6 Uppsøgn**
Fyri tey, sum eru sett í starv eftir hesum sáttmála, og sum í miðal hava meira enn 15 tíma arbeiðsviku, er uppsagnarfreistin - tá ið ikki onnur semja er - frá arbeiðsgevarans síðu henda:
1 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá ið viðkomandi hevur verið í starvi í 6 mánaðir.
3 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá ið viðkomandi hevur verið í starvi í meira enn 6 mánaðir.
Uppsagnarfreistin verður hækkað við einum mánaði fyri hvørji 3 ár, viðkomandi hevur verið í starvi, tó hægst 6 mánaðir.
Uppsagnartíðin hjá starvsfólki, sum eru vald til álitisfólk, verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið.
*Stk. 2.* Tá ið starvsfólk sigur upp, er uppsagnarfreistin - um annað ikki er avtalað - 1 mánaður frá einum 1. í mánaðinum at rokna.
*Stk. 3.* Uppsøgn eftir hesum reglum skal vera skrivlig og latin inn ikki seinni enn hin síðsta í mánaðinum frammanundan uppsagnartíðini.
*Stk. 4.* Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist, um ikki eymir upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini eru í tí ( í tí føri fær Starvmannafelagið samstundis fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum).
*Stk. 5.* Verður starvsfólk sagt at fara úr starvi, og er orsøkin eftir felagsins metan ógrundað, tá eiga Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið at taka málið til samráðingar og avgerðar millum sín.

Protokollat viðv. § 6:

*Um so er, at starvsfólk eftir leiðslunnar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur starvsfólkið í fyrstu syftu at fáa eina munnliga ávaring. Tá ið ávaring verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt.*
*Eftir hesa munnligu ávaring hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi og send felagnum við nágreiniligari grundgeving.*
*Tá ið uppsøgn verður givin skal hon sendast viðkomandi skrivliga.*
*Reglan í hesum protokollati er ikki galdandi, um starvsfólk hevur framt grovt misbrot í tænastuni.*
*Áðrenn uppsøgn uttan umsókn verður givin, skal stovnurin senda felagnum fráboðan.*

**§ 7 Sjúka**
Verður starvsfólk orsakað av sjúku ikki ført fyri at røkja arbeiði sítt, verður hetta mett sum lóglig orsøk til forfall, uttan so at viðkomandi, sum er í starvi eftir hesum sáttmála, av fyrisettum ráði ella

grovum ósketni hevur verið atvoldin til sjúkuna, ella, tá ið hann er settur í starvið, hevur dult sjúkuna.
*Stk. 2.* Fráveru vegna sjúku verður starvsfólk eftir áheitan at vátta skrivliga og við læknaváttan, um tað verður kravt. Varir sjúkan meira enn 2 vikur, kann tað verða kravt, at starvsfólkið útvegar gjøllari upplýsing frá lækna um, hvussu drúgv sjúkan ætlandi verður. Slíka læknaváttan rindar arbeiðsgevarin.
*Stk. 3.* Starvsfólk kunnu fáa frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga. Hava tey meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu tey fáa frí upp til 20 dagar.
Somu reglur eru galdandi fyri tímalønt starvsfólk, sett í starv eftir hesum sattmála. Sí fylgiskjal um avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum, pkt. 4.

**§ 8 Barnsferð**
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
Stk. 2. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinna fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinna farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis verða bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
Stk. 3. Prógvar starvskvinna við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum valig sjúka, og starvskvinna hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er farmvegis 28 vikur.
Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið eftir viku 14.
Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

**§ 9 Eftirsitiløn**
Tá ið starvsfólk, ið er lønt eftir hesum sáttmála, doyr, meðan tað er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/samlivandi ella børn undir 18 ár, sum tað hevur skyldu til at uppihalda, rætt til løn sansvarandi uppsagnartíðini, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir.
*Stk. 2.* Eftirsitiløn er tann løn, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyði, verður ikki roknað uppí eftirsitilønina.

**§ 10 Frítíð**
Frítíð er eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.
*Stk. 2.* Harumframt eiga starvsfólk rætt til serstakt frítíðargjald, sum er 12% av útgoldnari yvirtíðarløn í undanfarna innvinningarári.

*Stk. 3.* Sjúkradagar í frítíð verða vanliga viðroknaðir sum frítíðardagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúkan forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frítíðardagar verða tá givnir. Um starvsfólkið er óarbeiðsført, tá ið frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frítíðardagar. Somu reglur verða galdandi í samband við sjúku undir avspákan.
*Stk. 4.* Stovnurin ásetur, nær frítíðin skal vera. Stovnurin skal, so vítt arbeiðsumstøðurnar loyva tí, ganga ynskjum starvsfólksins um, nær frítíðin hjá tí einstaka skal vera, á møti. Stovnurin skal í so góðari tíð sum gjørligt siga starvsfólkunum frá hesum, tó í seinasta lagi 1 mánað, áðrenn frítíðin byrjar, uttan so at serligar umstøður forða fyri hesum.
*Stk. 5.* Frá 1. apríl 2020 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn, um so er at gjaldið fyri ólagaliga arbeiðstíð ikki verður latið í feriuni.

**§ 11 Farloyvi**
Starvsfólki verður givin tænastufrí uttan løn, har tað ikki stríðir móti stovnsins áhugamálum. Starvsfólk, sum fara í farloyvi í sambandi við útbúgving, ið tænir áhugamálum stovnsins kunnu eftir umsókn, fáa fulla ella niðursetta løn við eftirlønargjaldi. Tænastufrítíðin kann vara upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár, og hevur viðkomandi stovnur skyldu til at hava starv til viðkomandi, tá ið tænastufrítíðin er av. Tó skulu starvsfólk, ið hava starvast longur enn 5 ár, so vítt gjørligt altíð hava rætt til minst 1 árs tænastufrí.

> *Viðm.: Avgerð um at játta ella nokta farloyvi er ein fyrisitingarlig avgerð, og fyrisitingarligu reglurnar skulu havast í huga.*

**§ 12 Fyribils tænasta í hægri starvi**
Starvsfólk, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi fyribils røkja hægri starv í 1 viku samfelt ella meira, eiga í hesum tíðarskeiði at verða lønt við somu løn, sum tey høvdu fingið, um tey vórðu sett í starvið sambært hesum sáttmálanum, treytað av, at tey yvirtaka tær arbeiðsgávur, ið standast av hægra starvinum.

**§ 13 Eftirlønartrygging**
Stovnurin rindar vegna starvsfólkið, til eina eftirlønarskipan í LÍV, 15% í eftirlønargjaldi av tí til eina og hvørja tíð galdandi løn eftir lønarskalanum, men ikki av serstøkum gjøldum ella yvirtíðargjøldum. (Víst verður til § 32.)

**§ 14 Tænastuferðir og koyripeningur**
Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verður sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu.
*Stk. 2.* Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstaði er at rokna sum arbeiðstíð. Henda skal tó í mest møguligan mun liggja í vanligari arbeiðstíð. Ferðing millum kl. 22.00 og 08.00 verður ikki íroknað um starvsmaður fær ávíst og goldið seingjarpláss.
*Stk. 3.* Tá ið starvsfólk eru á tænastuferð í Føroyum, kann gisting á gistaringarhúsi verða endurrindað móti rokning.

**§ 15 Stovnsleiðarar**
Stovnsleiðarar eru ikki umfataðir av verkfalli ella verkbanni.

**§ 16 Aðrar skipanartreytir**
Viðvíkjandi teimum starvsfólkum, ið lønt eru eftir hesum sáttmála, burtursæð frá sjófólkum, verður víst til løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um rættarviðurskifti arbeiðsgevara og starvsmanna millum.
*Stk. 2.* Fyri sjófólk galda reglarnar í sjómannalógini.
*Stk. 3.* Fyri lærlingar galda tó ásetingarnar í løgtingslóg nr. 94 frá 29.12.1998 um Yrkisútbúgvingar ella løgtingslóg nr. 107 frá 29.12.1998 um støðisútbúgving inna fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið.

**§ 17 Onnur viðurskifti**
Arbeiðsviðurskifti, sum ikki eru greitt fastløgd í hesum sáttmála, verða at fastleggja við avtalu millum starvsfólkið og stovnin. Allar slíkar avtalur skulu Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið góðkenna.

## 2. Kapittul. Arbeiðstíð

**§ 18 Arbeiðstíðin**
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin á hvørjum einstøkum stovni verður at leggja í samráð millum leiðslu og starvsfólk, tó soleiðis, at leygardagur verður frídagur, har hetta letur seg gera.

**§ 19 Matarsteðgur**
Starvsfólk, sum arbeiða 2/3 tíð ella meiri, hava rætt til matarsteðg ½ tíma um dagin.
*Stk. 2.* Starvsfólk, sum arbeiða 1/2 tíð ella meiri men undir 2/3 tíð, hava rætt til matarsteðg 15 minuttir um dagin.
*Stk. 3.* Matarsteðgurin verður lagdur í samráð við starvsfólkið, soleiðis at endamálið við matar-steðginum verður rokkið.

**§ 20 Arbeiði skipað í vaktum**
Til starvsfólk, ið hava skiftandi arbeiðstíðir, skal gerast vaktarlisti, sum fevnir um eitt ávíst tíðarskeið, við áseting um, nær arbeiðið skal gerast, og nær frídagarnir liggja. Arbeiðstíðin í miðal uppgjørd yvir eitt tílíkt tíðarskeið skal vera 39 tímar um vikuna. Starvsfólk eiga 3 vikur fram at vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri avloysarar og tímalønt.
*Stk. 2.* Broytingar mugu ikki fara fram uttan undir heilt serligum umstøðum.
Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, fær starvsfólkið samsýning fyri 1 tíma eyka. Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina, men er ikki at rokna sum yvirtíð.
*Stk. 3.* Fyri arbeiði, sum fer út um fastlagda vakt og fyri arbeiði í teimum í § 26 við vanligum reglum ásettu frídøgum verður latin yvirtíðarløn eftir § 22.
*Stk. 4.* Ein sundurbýtt vakt má ikki strekkja seg yvir meiri enn 12 tímar, uttan at starvsfólkini eru samd í hesum, og tá verður goldið hálvt vaktargjald 1 eyka um tíman.
*Stk. 5.* Fellur ein frídagur eftir § 26 á ein dag, sum er frídagur eftir vaktarlista, verður annar frídagur latin í staðin, áðrenn næsti heili mánaði er farin.

**§ 21 Arbeiði í ólagaligum tíðarskeiðum**
Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt, t.e. millum 17.00 og 07.00 verður latið ótíðargjald 1eyka um tíman, ið er 18% av tímalønini í 3. lønarflokki á 1. stigi.

Fyri arbeiði um vikuskiftið verður latið ótíðargjald 2 eyka um tíman, ið er 36% av tímalønini í 3. lønarflokki á 1. stigi. Vikuskifti er frá fríggjadegi kl. 17.00 til mánamorgun kl. 07.00.
Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt eiga starvsfólk frí 3 tímar fyri hvørjar 40 tímar, arbeitt verður. Hesi gjøld verða roknað fyri byrjaðar hálvar tímar.
Stk. 2. Hjálparfólk, sum ikki eru í føstum starvi hjá Rúsdrekkasølu Landsins, og sum fyri tað mesta arbeiða leygardag ella eftir kl. 15. yrkadagar fáa ikki ótíðargjøld, fyrr enn tey hava arbeitt 12 tímar eina viku.

**§ 22 Yvirarbeiði**
Álagt arbeiði út yvir dagliga, planlagda arbeiðið hjá fulltíðarsettum, verður roknað sum yvirarbeiði.
*Stk. 2.* Sagt eigur at verða frá fastløgdum yvirarbeiði dagin fyri. Um so er, at nakað starvsfólk ber seg undan, um ikki er sagt frá dagin fyri, eigur hetta at verða tikið til eftirtektar.
*Stk. 3.* Verður starvsfólk eftir arbeiðstíð uttan ávaring kallað aftur til arbeiðis, verður samsýnt við 1 yvirtíma eyka. Hetta er bara, tá ið starvsfólkið hevur ikki tilkallivakt.
*Stk. 4.* Yvirarbeiði verður gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dagin
*Stk. 5.* Fyri 1., 2. og 3. yvirtíman verður samsýnt við 50 % aftrat vanligu tímalønini.
*Stk. 6.* Fyri 4. og fylgjandi yvirtíman og fyri yvirtímar leygardag, sunnudag, halgidag og fastan frídag verður latið + 100 %.
*Stk. 7.* Undir heilt serligum umstøðum, tá ið arbeitt verður út í eitt aftaná vanliga arbeiðstíð, verða reglurnar um úrtíðarløn at galda fyri alla hesa tíðina, ið arbeitt verður. Aftaná 3. yvirtíma gerandisdagar verður latin úrtíðarløn við hægstu viðbót fyri allar tímarnar, ið arbeitt verður. Áðrenn farið verður undir at gjalda vanliga løn aftur, skulu treytirnar í §42 í Løgtingslóg nr. 70 frá 11.05.2000 um arbeiðsumhvørvið verða uppfyltar
*Stk. 8.* Hava lærlingar undantaksvís yvirarbeiði, fáa teir yvirtíðarløn á 1. stigi í lønarflokkinum, teir koma í, tá ið teir eru útlærdir.
*Stk. 9.* Starvsfólk, sum eru lønt hægri enn í 6. lønarflokki, og sum fáa álagt yvirarbeiði, fáa bara lægru yvirtíðarlønina.
Fyri stig 28 og hægri verða niðan fyri standandi reglur galdandi.
Fyri drúgt álagt yvirtíðararbeiði galda hesar reglur:

1) Yvirtíðararbeiðið kann bara vera eftir vanliga arbeiðstíð.
2) Samsýning fyri drúgt yvirtíðararbeiði verður einans veitt, um yvirtíðararbeiðið er álagt og tímanýtslan er undir eftirliti.
3) Drúgt yvirtíðararbeiðið skal verða gjørt upp einaferð um mánaðin, ella eftir avtalu, t.d. pr. ársfjórðing ella tá ið ein áløgd uppgáva er liðug.
4) Drúgt yvirtíðararbeiðið skal sum meginregla verða frígingið. Eru tímarnir ikki frígingnir, tá ið næsti ársfjórðingurin er av, skulu teir verða útgoldnir. Í serligum førum, tá ið báðir partar eru samdir um tað, kunnu tímarnir verða fluttir, men tó ongantíð meiri enn 12 mánaðir.
5) Drúgt yvirtíðararbeiði skal verða frígingið 1 til 1,5. Tímalønin fyri útgoldnar yvirtíðartímar er 150% av tímalønini.
6) Teir fyrstu 20 áløgdu yvirtíðartímarnir hvønn ársfjórðingin eru tó samsýntir í lønini.

**§ 23 Meirarbeiði**
Meirarbeiði hjá parttíðarsettum er arbeiði, sum liggur út yvir miðalvikutímatalið hjá viðkomandi, men innan fyri miðalvikutímatalið hjá fulltíðarsettum, og sum er ikki at meta sum yvirarbeiði smb. § 22,1.
*Stk.2.* Parttíðarsett skulu hava boð um meirarbeiði í arbeiðstíðini, seinast dagin fyri. Fyri vantandi boð verður at rokna 1 meirarbeiðstíma eyka.

*Stk. 3.* Meirarbeiði verður lønt við tímaløn ella avspákað 1:1. Verður uppgjørt byrjaðar hálvar tímar.

**§ 24 Sjálvboðið eyka arbeiði**
Eitt nú tá ið arbeiðspláss er undirmannað í samband við langtíðarsjúku, barnsferð ella feriu og tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði.
*Stk. 2.* Sjálvboðið eyka arbeiði kann eisini vera tá ið starvsfólkið av egnum ávum ynskir sær eitt hægri tímatal enn avtalað er í setanaravtaluni. Bæði fólk í fullum starvi og parttíðar sett kunnu átaka sær sjálvboðið eyka arbeiði.
*Stk. 3* Sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað millum starvsfólkið og arbeiðsplássið. Avtalurnar skulu vera skrivligar og skulu vera gjørdar í góðari tíð, áðrenn eykaarbeiði byrjar. Starvsfólkið kunnar álitisfólkið um einstøku avtaluna.
*Stk. 4.* Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin má vera í minsta lagi tímalønin + vaktargjald II. Tó má hon ongantíð vera hægri enn yvirtíðargjald 2.
*Stk. 5.* Sjálvboðið eyka arbeiði má bert vera avmarkaða tíð. Álitisfólkið skal verða kunnað um í hvønn mun sjálvboðið eyka arbeiði verður avtalað.

**§ 25 Tilkallivakt**
Fyri tilkallivakt verður latið vaktargjald 1 um tíman. Fyri vikuskiftistilkallivakt verður latið vaktargjald 2 um tíman. Gjaldið fyri tilkallivakt verður goldið frá tí, at tilkallivaktin tekur við til hon endar.
*Stk. 2.* Tilkallivakt á teimum í § 26 ásettu frídøgum verður latið vaktargjald 2 um tíman. Fyri tilkallivakt halgi- og frídagar sambært § 26, sunnudagar undantiknir, verður veittur 1 frídagur.
*Stk. 3.* Fyri arbeiði undir tilkallivakt verður veitt yvirtíðargjald sambært § 22.
*Stk. 4.* Vaktargjald og yvirtíðargjald kunnu ikki latast fyri somu tímar.
*Stk. 5.* Tá ið tilkallivakt er av slíkum slag, at tað er rímiligt at víkja frá omanfyristandandi, eitt nú lítið tyngjandi tilkallivaktir, verður samsyning avtalað serstakt í starvsmetingarnevndini.

**§ 26 Fastir frídagar**
Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagur, ólavsøkudagur og allir halgidagar eru heilir frídagar. Grundlógardagur og ólavsøkuaftan eru hálvir frídagar, t.e. eftir kl. 12.
*Stk. 2.* Verður arbeitt í ásettu frítíð, verður goldið hægra yvirtíðargjaldið sambært § 22.

**§ 27 Gjald ella avspákan**
Uppspardar tímar, áløgd yvirtíð og ymisk gjøld (vaktargjøld, gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð og líknandi) verða givin sum gjald ella sum avspákan. Er ikki avspákað innan 3 mánaðir og er ikki avtala um avspákan gjørd, verður goldið út. Ymisk gjøld verða roknað til tímar við at býta við tímalønini hjá viðkomandi og øvut.
*Stk. 2.* Millum starvsfólk og arbeiðsgevara verður avtalað, hvussu yvirarbeiði og meirarbeiði verður avspákað. Verður tilrættisløgd avspákan tikin aftur, skal hetta kunngerast í seinasta lagi 72 tímar, áðrenn farið verður undir arbeiðið, sum liggur beint áðrenn, farið verður undir frídagar. Er ikki fráboðað rættstundis, skal tíðin samsýnast sum yvirtíð.

**§ 28 Samsýning fyri skeiðluttøku**
Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 7,8 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó

við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 26, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, samb. § 21.
*Stk. 2.* Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.
*Stk. 3.* Samsýnt verður fyri ferðatíðina til skeiðsstaðið (uttanbíggja), um talan er um ferðing sjóvegis, ið varðar longri enn ein tíma. Samsýnt verður ikki, um ferðatíðin ikki er longri enn ferðatíðin vanliga er frá heimi til vanliga arbeiðsstaðin. Samsýnt verður í mesta lagi fyri 4 arbeiðstímar. Ferðing í bili verður roknað í skeiðstíðina.
*Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1-3 kunnu við avtalu millum starvsfólk og stovnin frávíkjast, men ger tílík avtala, at stovnurin verður stillaður verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Fíggjarmálaráðið góðkenna hana.

**§ 29 Frí við ongari løn**
Tá ið starvsfólk fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.
a) Tá ið starvsfólkið er burtur heilar mánaðir, verða drignar heilar mánaðarlønir.
b) Tá ið starvsfólk er burtur vikur, dagar ella tímar, verður drigið fyri teir tímar, tey undir vanligum umstøðum høvdu verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2028 (39*52). Við í árslønina verða roknað øll gjøld, sum verða goldin sum føst mánaðargjøld.

## 3. Kapittul. Um løn og at flokka størv
**§ 30 At flokka**
Størvini eru flokkað í lønarflokkunum I til VIII. Í fylgiskjali 1 um flokkanir eru ásettar leiðreglur fyri, hvussu størvini verða flokkað.

**§ 31 Lønaraldur**
Starvsfólkið er 1 ár á hvørjum stigi.
*Stk. 2.* Lønaraldurin er vanliga tað áramál, sum starvsfólkið hevur arbeitt innan viðkomandi øki. Lønaraldurin hjá faklærdum og útbúnum er vanliga tað áramál, sum starvsfólkið hevur verið í arbeiði, ið er treytað av teirri útbúgving, tað hevur. Starvsfólk fær roknaðan fullan starvsaldur, hevur tað í minsta lagi hálvt starv. Er talan um minni enn hálvt starv, verður starvsaldurin roknaður lutfalsliga.
*Stk. 3.* Verður starvsfólk sett í starv í hægri bólki enn í starvinum frammanundan, fær tað við setanina lønaraldur, ið svarar til, at viðkomandi verður løntur eftir nærmasta hægri lønarstigi í nýggja lønarflokkinum. Lønaraldurin verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum í fyrra starvinum hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggja bólkinum fær longu frá hesum mundi nýggja aldursviðbót. Eisini er møguleiki fyri, at starvsfólkið fær við sær fullan starvsaldur.
*Stk. 4.* Verður starvsfólk sett í starv í lægri bólki enn í starvinum frammanundan, verður lønaraldurin í fyrra starvinum taldur við.
*Stk. 5.* Tá ið viðurskiftini tala fyri tí, kunnu partarnir gera avtalu um starvsaldur eftir øðrum reglum.

**§ 32 Løn**
Frá 1. oktober 2024 hækkar mánaðarlønirnar 4,75%
Frá 1. apríl 2025 hækkar mánaðarlønirnar 2,9%

Annars er galdandi tann regla, at eingin, sum nú er í starvi, kann fara niður í løn.
*Stk. 2.* Mánaðarlønin skal vera goldin í seinasta lagi síðsta gerandisdagin í mánaðinum.

**§ 33 Tímaløn**
Tímalønin verður roknað sum 1/2028 av árslønini ella 1/169 av mánaðarlønini.

**§ 34 Viðbøtur**
Fyri fast meirarbeiði kann verða veitt viðbót.
*Stk. 2.* Verður reiðiviðbót veitt, er hon fyri 35 tímar um ársfjórðingin.
*Stk. 3.* Fyri drúgt álagt yvirtíðararbeiðið, sum er meiri enn 35 tímar um ársfjórðingin, verður veitt yvirtíðargjald eftir umsókn.
Stk. 4. **Førleikaviðbøtur.** Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtur eru førleikagevandi og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal útbúgvingin verða kravd og eftirútbúgvingin skal verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um starvsfólk hava tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bara ein viðbót latin. Er starvið parttíðarsett, verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.

| | |
|---|---|
| Eftirútbúgving 120 tímar: | 750,00 kr. |
| Eftirútbúgving 160 tímar: | 1.000,00 kr. |
| Eftirútbúgving 200 tímar: | 1.250,00 kr. |

**§ 35 Næmingar**
Lærlingar verða 1., 2., 3. og 4. læruárið løntir við ávikavist 40, 50, 60 og 70 % av byrjanarlønini fyri útlærd. Er lærutíðin stytri enn 4 ár, verða seinastu lønarstigini nýtt, soleiðis at seinasta heila læruár verður lønt eftir 4. lønarstigi (70 %). Er lærutíðin longri enn 4 ár, verður lønin eftir 4. læruár 80 % av lønini fyri útlærd.
*Stk. 2.* Har lærlingur gongur á handilsskúla um dagin, verður givið honum frítt at fara í arbeiðstíðini, uttan at tíðin verður frádrigin í løn hansara. Verður skúlagongdin uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, skal hetta gevast aftur í vanligum tímatali. Fer skúlagongdin fram frídagar ella leygardagar, skal lærlingurin hava samsvarandi frítíð onkran av yrkadøgunum.

**§ 36 Praktikantar**
Er partur av útbúgvingini skipaður sum praktikk, sum hjá t.d. tíðindafólki og akademiøkonomi, fær praktikanturin 80 % av byrjanarlønini hjá útlærdum. Praktikktíðarskeiðið hjá sosialráðgevalesandi er, sambært galdandi lestrarreglum, ólønt.
*Stk. 2.* Starvsfólk, ið hevur ábyrgdina av praktiktíðini hjá einum lesandi, fær eina praktikkvegleið-araviðbót. Hevur viðkomandi starvsfólk, nomið sær praktikkvegleiðaraútbúgving er viðbótin kr. 1.500,00 um mánaðin og fyri tann, ið ikki hevur nomið sær hesa, er viðbótin kr. 1.200,00 um mánaðin, meðan viðkomandi hevur praktikant.

**§ 37 Starvsmetingarnevnd**
Í sáttmálaskeiðnum situr starvsmetingarnevnd, við tveimum umboðum fyri hvønn partin. Uppgávan hjá nevndini er at útbyggja og eftirmeta lønarskipanina, viðgera øll flokkanarmál og flokka nýggj størv. Eru stovnar, sum í sáttmálaskeiðnum eru áhugaðir at fara undir staðbundnar royndarskipanir við nýggjum lønarskipanum, fara partarnir við vælvild at virka fyri tí. Nevndin skal eisini virka fyri, at útbúgvingarskipanir verða gjørdar fyri ávísar starvsbólkar. Tað verður gjørt í samráð við stovnin.

## 4. Kapittul. Sjófólk

**Heilsuváttan**
Reiðarin rindar fyri kravdar læknaváttanir hjá siglandi fólki.

## 4.1. Fiskiveiðueftirlitið

**§ 38 Arbeiðstíð**
Vanliga arbeiðstíðin er tvær vikur á 84 tímar og síðani frí í tvær vikur.
*Stk. 2.* Einaferð um árið kann arbeiðstíðin verða skipað sum 4 vikur á 84 tímar og síðani frí í 4 vikur, ella sum frí í 2 vikur, 4 vikur á 84 vikur og síðani frí í 2 vikur.

**§ 39 Flokkan og starvsaldur**
Dekkarin verður flokkaður í lønarflokki V, bátsmaðurin fær tvey lønarstig eyka og kokkurin verður flokkaður í lønarflokki VI.
*Stk. 2.* Stovnurin kann, har umstøður tala fyri tí, loyva at annar starvsaldur telur við, um talan er um tænastu í líkastillaðum ella hægri starvi. Stovnurin skal í tílíkum føri senda málið til Starvsfelagið til ummælis.
*Stk. 3.* Ófulltikin dekkari gongur eftir ásetingunum fyri næmingar í § 35.

**§ 40 Yvirtíðarlønir**
Manningarnar hava ikki rætt til yvirtíðarløn, hvørki gerandisdagar ella sunnu- og halgidagar, tí henda er viðroknað í føstu lønini. Verður ein boðsendur til arbeiðis í avspákanartíðini ella á føstu frídøgunum, til dømis tá ið skipini eru til umvælingar og eftirlit, eins og skeiðvirksemi kemur fyri, verður latin yvirtíðarløn soleiðis:
Yvirtíðarløn 1: 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. lønarstigi í 5. lønarflokki + 30% um tíman, verður latin yrkadagar.
Yvirtíðarløn 2: 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. lønarstigi í 5. lønarflokki + 40% um tíman, verður latin sunnu- og halgidagar.
*Stk. 2.* Hevur sjómaður upparbeitt yvirtíð sambært stk. 1, skal tað vera viðkomandi loyvt, har viðurskiftini loyva tí, at fáa hesa tíð útgoldna ella lagda aftrat árligu frítíðini. Tá skal henda avspákan verða roknað ígildis yvirtíðarlønini.
*Stk. 3.* Tá ið skip hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni eru seinkað orsakað av at sleip/bjarging strekkir seg inn í avspákanartíðina hjá manningunum, fáa tær somu løn og avspákan sum fyri siglitíð eftir vanligari vaktarskipan + 30% yrkadagar og 40% sunnu- og halgidagar, tó ikki minni enn fyri 12 tímars arbeiði. Stk. 3 er bara galdandi, um skipið er seinkað meira enn 3 tímar roknað frá vanliga fyriskipaðari avloysing (manningarskifti).
*Stk. 4.* Verður í mistu avspaseringstíðini eftir stk. 3 arbeitt í meira enn 12 tímar um samdøgrið (vaktarbrot) verður latin úrtíðarløn 1 fyri 13. og 14. tíman og úrtíðarløn 2 fyri eftirfylgjandi tímar, so leingi arbeitt verður.
*Stk. 5.* Fyri arbeiði í sambandi við at sleipa og bjarg "deyð" skip uttan fyri havn verður goldin samsýning, sum er 1/4160 av samlaðu árslønini í 5. lønarflokki á 1. stigi + 30% um tíman yrkadagar og 1/4160 + 40% sunnu- og halgidagar.
Nevnda samsýning verður bæði goldin teimum, sum hava vakt, og teimum, sum áttu at verið á frívakt. "Deyð skip" eru skip, haðani manningin er rýmd, ella sum av aðrari orsøk ikki hava manning umborð.
*Stk. 6.* Jólaaftan, jóladagur og 2. jóladagur eru fastir frídagar. Manningarnar kunnu ikki bera seg undan, um álagt verður teimum at sigla nevndu dagar. Um siglt verður, verður yvirtíðarløn 2 latin fyri allar tímarnar sbrt. stk. 1, í sáttmálanum.

**§ 41 Bjarging o.a.**
Fyri at sleipa og bjarga útlendsk skip verður latið manningunum 20% av endurgjaldinum í samsýning, sum verður býtt millum menninar í mun til føstu lønir teirra.

*Stk. 2.* Undir sáttmálaloysi kunnu manningarnar ikki bera seg undan at taka lut í bjargingartænastu, jbr. tó notat dagfest tann 11. mai 1981.
*Stk. 3.* Fyri kaving, tó ikki venjing, verður goldið kavarum og hjálparmonnum teirra sambært teimum av Tryggingarfelagnum Føroyar góðkendu gjøldum fyri kaving.

## 4.2. Havstovan

**§ 42 Arbeiðstíð**
Til rannsóknir, fiskiroyndir, fiskiskap og aðrar uppgávur, sum reiðaríið áleggur, mynstrar manningin hvør sær fyri tað tíðarskeið, hon skal verða við.
*Stk. 2.* Fasta lønin og avspaseringstíðin verður tald frá tí degi, mynstrað er, og til skipið fer nýggjan túr, og maðurin ikki er við.
Manningin fær fasta løn pr. dag, roknað sum 1/360 av árslønini í lønartalvuni. Fyri ein dag umborð verður veittur ein dagur í landi.
*Stk. 3.* Vanliga arbeiðstíðin umborð er 12 tímar í miðal um samdøgrið.
*Stk. 4.* Havstovan letur dekkarum kr. 2.500,00 (við mvg) um árið til váttaðar útreiðslur til keyp av arbeiðsklæðum.

**§ 43 Flokkan og starvsaldur**
Dekkarin verður flokkaður í lønarflokki V og kokkurin verður flokkaður í lønarflokki VI.
*Stk. 2.* Stovnurin kann, har umstøður tala fyri tí, loyva at annar starvsaldur telur við, um talan er um tænastu í líkastillaðum ella hægri starvi. Stovnurin skal í tílíkum føri senda málið til Starvsfelagið til ummælis.

**§ 44 Yvirtíðarlønir**
Manningin hevur ikki rætt til yvirtíðarløn hvørki gerandis- ella sunnudagar, tí hon er roknað í føstu lønini.
*Stk. 2.* Yvirtíðarløn 1: 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. stig í 5. lønarflokki +30 %.
Yvirtíðarløn 2: 1/2080 av samlaðu árshýruni á 1. stig í 5. lønarflokki + 40 %.
*Stk. 3.* Verður manningin boðsend til arbeiðis í frítíð, t.d. tá ið skipið er til umvælingar og eftirlit, skal flytast ella fyri manglandi avspákan, smbr. § 42, stk. 2 og 3, verður yrkadagar goldin yvirtíðarløn 1, og sunnu- og halgidagar yvirtíðarløn 2.
*Stk. 4.* Fyri arbeiði á teimum í § 26 nevndu frídøgum, verður goldin yvirtíðarløn 2.
*Stk. 5.* Eina ferð um árið verður arbeiðsdagatalið talt saman og tilsvarandi frídagatalið. Verður avlop, verður yvirtíðarløn 1 goldin fyri 5/7 av avlopinum og yvirtíðarløn 2 fyri 2/7 av avlopinum.

**§ 45 Avtala um arbeiði umborð á Jákup Sverra**
Tá starvsfólk á Havstovuni, ella frá øðrum almennum stovnum, eru við rannsóknarskipi, fáa tey (tó ikki stovnsleiðarin) hesa samsýning:

1. Fyri hvønn dag umborð verður veitt ein upphædd, sum er 4 % av lønini í 26 lønarflokki á 1. Stigi eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Henda samsýningin er umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.
2. Fyri at vera við fremmandum skipi (t.e. ikki rannsóknarskipi), verður fyri hvønn dag umborð veitt ein upphædd, sum er 4,5 % av lønini í 26. lønarflokki á stigi 1 eftir lønartalvuni hjá tænastumonnum landsins. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai. Henda samsýningin er umframt ta vanligu lønina, sum starvsfólkini fáa sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

3. Fyri hvønn leygardag og fyri hvønn sunnudag umborð verður veittur ein dagur frí í landi.
4. Fyri skeivar halgidagar fáa starvsfólk sama yvirtíðargjald sum dekkarar á rannsóknarskipinum, tá tey eru við hesar dagar. Dagarnir umborð eru at rokna teir dagar, tá skipið hevur loyst frá kai.

### 4.3. Strandfaraskip Landsins

**§ 46. Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin verður løgd soleiðis, at arbeiðstíðin í 2 mánaðir ikki er omanfyri 2x197,2 tímar (197,2 = 45,5 x 52/12), og arbeiðstíðin í ein mánað ikki er omanfyri 250 tímar. Arbeitt verður eftir fastlagdari arbeiðsskipan, har meginreglan er eitt tíðarskeið umboðr og tilsvarandi tíðarskeið frí.
Í staðbundnari avtalu, gjørd millum reiðarí og felagið, kann verða vikið frá ásetingunum um yvir hvussu langt tíðarskeið, arbeiðstíðin verður gjørd upp fyri.
*Stk. 2.* Fyri tímaløntan avloysara verður arbeiðstíðin gjørd upp fyri hvønn mánað, tó kann arbeiðstíðin í ein mánaða ikki vera oman fyri 300 tímar.
*Stk. 3.* Fastur avloysari arbeiðir eftir arebiðsætlan løgd fyri 3 mánaðir ísenn. Arbeiðstíðin kann verða ymist frá mánaða til mánaða, tó kann arbeiðstíðin í ein mánað ikki vera oman fyri 300 tímar. Fyri hvønn ársfjórðing verður arbeiðstíðin uppgjørd og møguligir meirtímar útgoldnir smb. §16. Arbeiðsnormurin fyir hvønn ársfjórðing roknast sum 2366/4=591,5 tímar. Um fastur avloysari fer úr starvi, verða írestandi tímar ikki mótroknaðir mánaðarlønini.
*Stk. 4.* Staðbundin avtala kann eisini verða gjørd millum reiðarí og felagið um, at arbeiðstíðin á einum skipi ella á einari farleið verður broytt. Mánaðarlønin verður tá 1/192,7 fyri hvønn tíma. Báðir partar kunnu uppsiga avtaluna við 3 mánaða freist, til ein fyrsta í mánaðinum.

*Dømi. Verður arbeiðstíðin broytt til 42 tímar um vikuna, er arbeiðstíðin um mánaðin 182 tímar (42*52/12). Arbeiðstíðin verður 15,2 tímar færri um mánaðin (197,2-182) og verður mánaðarlønin lække við 15,2/197,2.*

*Stk.* 5. Sjófólk skal hava í minsta lagi 16 frídagar hvørjar 2 mánaðir.
*Stk. 6.* Einstakur frídagur skal í minsta lagi vera 36 tímar. Er talan um fleiri fylgjandi frídagar, verða teir roknaðir sum 24 tímar hvør.
*Stk. 7* Mattíðin verður ikki mótroknað arbeiðstíðini, tó í mesta lagi 1 tíma hvørja ferð og í mesta lagi 2 ferðir um dagin. Mattíðin verður løgd soleiðis, at tað darvar arbeiðsgongdina minst møguligt.
*Stk. 8.* Arbeiðstíðin kann verða slitin tvær ferðir um dagin, og skal slitið verða 1 tími samangangandi, áðrenn tað kann dragast frá arbeiðstíðini. Hesum viðvíkjandi verður víst til avmarkingar í kunngerð nr. 107 frá 2. november 2012 um hvílitíðina hjá sjófólki. § 6, stk. 2.
*Stk. 9.* Fer skip í dokk uttanlanda fylgir manningin skipinum, og manningarskifti verður ikki framt í dokkingartíðarskeiðinum. Fyri arbeiði í frívikuni verður veitt 50% afturat vikulønini fyri 91 tímar.
*Stk. 10.* Írestandi arbeiðstíð undir uppiløgu verður roknað sum avspasering forút, tó ikki, um skipið liggur vegna illveður ella brek, og arbeitt verður umborð.

**§ 46a Minimumsigling.**
Í samband við arbeiðssteðg binda partarnir seg til at lata skipini á øllum farleiðum sigla minst einaferð um samdøgrið. Sigling í Kalsoynna, í Sandoynna og til Nólsoyar skal tó verða minst 2 ferðir um dagin í 21 dagar. Aftan á tað skulu partarnir verða samdir um framhaldandi sigling.
*Stk. 2.* Útoyggjar eru undantiknar skerjingini í siglingini samb. stk. 1. Undantakið er galdandi fyri leiðirnar 58 og 66.
*Stk. 3.* Sum arbeiðssteðgur er her at rokna verkfall, verkbann, ella onnur niðurlegging av arbeiðinum.

*Stk. 4.* Sigling smb. Stk. 2. verður lønt við tímalønini (ásett í §5) x 1.5, fyri í minsta lagi fyri 4 tímar hvørja ferð.
*Stk. 5.* Ásetingin um sigling smb. stk. 1, er galdandi frá tí at arbeiðssteðgur er settur í verk smb. serstakari avtalu um fráboðan av arbeiðssteðgi.

**§ 47. Arbeiðsætlan**
Arbeiðsætlan verður gjørd fyri 4 vikur í senn. Í seinasta lagi 3 vikur áðrenn 4 viku skeiðið er av, verður ein nýggj arbeiðsætlan gjørd. Eisini verður gjørd vegleiðandi arbeiðsætlan fyri hvørjar 3 mánaðir. Hetta er ikki galdandi fyri avloysarar.
*Stk. 2.* Broytingar í arbeiðsætlanini eiga bara at verða gjørdar undir serligum umstøðum.
*Stk 3.* Verður sjófólk boðsent til arbeiðis á frídegi, við styttri fráboðanartíð enn 72 tímum, verða arbeiddu tímarnir samsýntir sum meirtímar. Hetta er ikki galdandi fyri avloysarar.
*Stk. 4.* Vaktarskipanin verður send álitisfólkinum ella samstarvsnevndini til viðmerkingar.

**§ 48. Feria og onnur frítíð**
Feria og onnur frítíð skal sum meginregla verða søkt um og veitt í heilum siglingstíðarskeiðum.
*Stk. 2.* Einstakir frídagar skulu tó verða veittir, býta sjófólk um sínamillum ella um avloysarar eru tøkir. Treytin er tó, at reiðaríið fær ikki eyka kostnað av tí.

**§ 49. Tímaløn**
Tímalønin verður roknað soleiðis:

- árslønn á viðkomandi stigi / 2366.

**§ 50. Meirarbeiði og avspákan**
Tímalønin fyri meirarbeiði verður roknað soleiðis:
Árslønn á viðkomandi stigi/2366 x 1,50.
Fyri frakttúrar, sum viðføra meirtímar, verður tímalønin roknað sum árslønn á viðkomandi stigi/2366 x 1,75. Verða hesir meirarbeiðstímar avspákaðir, verður hvør meirarbeiðstími roknaður sum 1,75 tími.
Um starvsfólk verða áløgd at taka meirarbeiði í einum frítíðarskeiði í fastløgdu arbeiðsskipanini, verður fyri fyrst 3 tímarnar veitt 50% afturatr tímalønini (árslønn á viðkomandi stigi/2366 x 1,50).
Fyri 4. og fylgjandi yvirtímar verður veitt 100% afturat tímalønini (árslønn á viðkomandi stigi/2366 x 2,00).
Løn fyri meirarbeiði í frítíðarskeiðinum kann ongantíð verða minni enn 5 tímar.

*Stk. 2.* Verða meirarbeiðstímar avspákaðir, skal føst avtala verða gjørd um, nær teir verða avspákaðir. Meirtímar, sum eru ikki lagdir inn í næsta vaktarskeið ella sum føst avspákanaravtala ikki er gjørd um, verða útgoldnir.
*Stk. 3.* Verður tilrættisløgd avspákan tikin aftur, skal hetta verða fráboðað í seinasta lagi 96 tímar, áðrenn farið verður undir avspákanina.
*Stk. 4.* Samsýning fyri at arbeiða sunnudagar, halgidagar og fastar frídagar er roknað við í føstu lønini.

**§ 51. Meirarbeiðsviðbót**
Sjófólk, sum hevur nógv álagt meirarbeiði, kann fáa meirarbeiðsviðbót. Viðbótin verður givin fyri 35 meirarbeiðstímar um ársfjórðingin. Fyri drúgt álagt meirarbeiði, sum er meiri enn 35 tímar um ársfjórðingin, verður samsýnt eftir ásetingunum í § 50.
*Stk. 2.* Tímarnir verða brúktir, tá ið okkurt stingur seg upp í mynstringartíðini og sum hevur við sær longri arbeiðsdag, enn ásett í arbeiðsætlanini.

*Stk. 3.* Staðbundin avtala kann verða gjørd millum reiðarí og álitisfólk um at broyta tímatalið í stk. 1. Tá verður viðbótin broytt samsvarandi.

**§ 52. Tilkallivakt**
Fyri tilkallivakt eru ásetingarnar í § 25 galdandi.
*Stk. 2.* Vaktargjald sambært § 25 verður eisini latið tá serligar umstøður gera, at skipsleiðslan krevur, at manningin er umborð um náttina, t.d. orsaka av illveðri.

**§ 53. Kostpeningur hjá sjófólkum Strandfaraskipum Landsins**
Sjófólk eiga, tá ið tey sigla, rætt til frían kost umborð. Eisini eiga tey frítt uppihald, kunnu tey ikki búgva umborð, tá ið skipið er heimanífrá, og tá ið ikki ber til hjá teimum at búgva heima, meðan arbeitt verður umborð. Kann ikki matskaffast umborð, verður veitt endurgjald á kr. 200,00 um dagin (kostpeningur). Ber ikki til at sova umborð, skal Strandferðslan gjalda kost- og uppihaldspening. Kostpeningurin hækkar til 200,00 kr um dagin, galdandi fyri tey skip, sum ikki hava kokk umborð. Keyp av kosti til skip, sum ikki hava kok umborð, steðgar sama dagin.

**§ 54. Skeið**
Sjófólk hevur skyldu til at fara á tey skeið, sum Strandfaraskip Landsins fyriskrivað. Tá ið skeiðvirksemi fer fram í frítíðini verður samsýnt við vanligari dagløn, ið svarar til 7,8 tímar pr. dag. Samsýnt verður fyri ferðatíðina til skeiðsstaðið (uttanbíggja), um talan er um ferðing sjóvegis, ið varðar longri enn ein tíma. Samsýnt verður ikki, um ferðatíðin ikki er longri enn ferðatíðin vanliga er frá heimi til vanliga arbeiðsstaðin. Samsýnt verður í mesta lagi fyri 4 arbeiðstímar. Ferðing í bili verður roknað í skeiðstíðina.Er neyðugt hjá sjófólki at fara heiman í frá dagin fyri skeiðið byrjar, verður ferðatíðin samsýnt við brúktum tímum, tó í mesta lagi 7 tímum pr. dag.
*Stk. 2.* Tá ið skeiðvirksemi fer fram í arbeiðstíðini verður tað tímatali rindað, ið viðkomandi vanliga vildi verið í tænastu.
*Stk. 3.* Fara sjófólk sjálvi á slík skeið í fríviku, verður tað ikki roknað sum arbeiðstíð. Tó kann avtala verða gjørd í hvørjum einstøkum føri, um Strandfaraskip Landsins skulu gjalda skeiðkostnaðin.

**§ 55. Flokkanir**
Tænastustarvsfólk/catringstarvsfólk er flokkað í 6. lønarflokki.
Ófulltikin dekkari er flokkaður í 6. lønarflokki.
Dekkari er flokkaður í 6. lønarflokki + 1 stig.
Bátsmaður er flokkaður í 6. lønarflokki + 2 stig.
Kokkur er flokkaður í 6. lønarflokki + 3 stig.
*Stk. 2.* Stovnurin kann, har umstøður tala fyri tí, loyva at annar starvsaldur telur við, um talan er um tænastu í líkastillaður ella hægri starvi. Stovnurin skal í tílíkum føri senda málið til Starvsfelagið til ummælis.

**§ 56 Fastir avloysarar hjá Strandfaraskip Landsins.**
Fastir avloysarar kunnu verða settir í fast starv eftir flokking í §55.

**§ 57 Fyribils tænasta í hægri starvi**
Starvsfólk, sum eftir serligum boðum ella eftir fastløgdum arbeiðslagi, fyribils røkja hægri starv í minst 1 vakt, eiga í hesum tíðarskeiði at verða lønt við somu løn, sum tey høvdu fingið, um tey vórðu sett í starvið, treytað av, at tey yvirtaka tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

**§ 58. Fylgibólkur**
Í sáttmálaskeiðnum situr bólkur, við tveimum umboðum fyri hvønn partin. Uppgávan hjá bólkinum er at viðgera teir trupulleikar, sum verða í skipanina.

## 5. Kapittul. Sjúkraflutningstænastan

**§ 59. Arbeiðstíð/yvirarbeiðið/frídagar.**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Sundurbýting av arbeiðstíðini uppá teir einstøku dagarnar í vikuni verður at fastseta av sjúkrahúsinum, alt eftir arbeiðshátti. Vanliga eigur vaktarskema tó, áðrenn tað verður lagt, at verða fyrilagt sjúkrahúsarbeiðarunum til ummælis. Verður arbeitt longur enn 7½ tíma um dagin, ella longur enn eina møguliga avtalaða tíð, sum ikki má fara upp um 9 tímar, verður henda tíð at rokna sum yvirarbeiði. Mattíðin, sum ikki má fara upp um ½ tíma, verður ikki frádrigin tí dagligu arbeiðstíðini. Matarsteðgurin verður lagdur í samráð við starvsfólkið, soleiðis at endamálið við matarsteðinginum verður rokkið.
**Stk. 2.** Yvirarbeiðið eigur at verða afturbøtt við frítíð. Til ta tíð, arbeitt hevur verið yvir vanligar yrkadagar, verður at leggja 50% javnað uppeftir til ½ tímar. Fyri yvirarbeiði leygardagar, sunnudagar og halgidagar verður at leggja 100%, javnað uppeftir til ½ tímar. Um so er, at yvirarbeiði ikki er afturbøtt við frítíð, sum omanfyri ásett, í sama ella eftirfylgjandi mánaði, verður hetta arbeiði at gjalda sum yvirarbeiði við yvirtíðarløn, soleiðis: Fyri 1., 2. og 3. tíma veður veitt normalløn +50%, roknað út frá tí lønarstigi viðkomandi portørur/ambulansustarvsfólk er á, tá ið arbeiðið fer fram.
**Stk. 3.** Portørar/ambulansustarvsfólk hava rætt til 2 frídagar um vikuna. Á hesum døgum kann ikki áleggjast teimum vakt. Um frídagur í einstøkum førum eftir umstøðunum ikki kann verða givin, verður hann at afturbøta so skjótt sum gjørligt við uppískoyti av 50% av tí tænastu, sum útint er á tí mista frídegnum, javnað uppeftir til ½ tímar. Um tann misti frídagurin ikki er afturbøttur við omanfyri nevndu frítíð í sama ella eftirfylgjandi mánaði, verður frídagurin at gjalda eftir reglum um yvirarbeiði, samb. stk. 2.
Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal hetta fráboðast við minst 48 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, skal portørurin/ambulansustarvsfólkið hava viðbót kr. 17.57 um tíman. Broytt arbeiðstíð er at skiljasum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina, men ikki er at rokna sum úrtíð.
**Stk. 4.** Portørar/ambulansustarvsfólk, sum verða send í avspákan, skulu hava fráboðan í minsta lagi 48 tímar frammanundan. Avspákan skal vera í minsta lagi hálvan dag ella 4 tímar í dagtímum. Um portørur/ambulansustarvsfólk verður boðsent í avspákingartíðini, skal hetta kunngerast í seinasta lagi 48 tímar, áðrenn byrjað verður uppá arbeiði, annars verður arbeiðið afturbøtt samb. §59, stk. 2.
**Stk. 6.** Sum samsýning fyri, at ein partur av frídøgunum ikki fellur leygar- og sunnudagar, verður veitt portørum ½ frídaga fyri hvønn av hesum, teir arbeiða. Í staðin fyri frítíð kann verða veitt samsýning í peningi samsvarandi 2% av mánaðarlønini fyir hvønn av hesum døgum, teir arbeiða.
**Stk. 7**. Arbeiðið millum kl. 24.00 fríggjakvøld og kl. 08.00 mánamorgun verður at roknað sum arbeiði á sunnudøgum.
**Stk. 8.** Viðvíkjandi loyvi at hava aðra lønandi vinnu uttan fyri tænastu, galda reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958, §4.
**Stk. 9**. Verður portørur/ambulansastarvsfólk í sambandi við sjúkraflutning noyddur at liggja nátt, fær viðkomandi løn, til arbeiðstíðin endar, ella til hann er leysur av sjúklinginum, somuleiðis fær hann løn frá tí, at sjúklingurin verður heintaður aftur, ella frá tí, at arbeiðstíðin byrjar aftur. Eisini verður veitt honum endurgjald smb. Tænastuferð landsins.
**Stk. 10**. Fastir frídagar verða samsýntir smb. § 26.

**§ 60 Tilkallivakt.**
Portørar/ambulansastarvsfólk hava sambært vaktarskipan tilkallivakt frá heiminum við skyldu at møta eftir boðsending.
**Stk. 2.** Fyri tilkallivakt verður goldin upphædd, sum svarar til 25% av tímalønini á lønarflokki 3 stig 2 um tíman.
Eisini kunnu tilkallivaktartímarnir verða afturbøttir við frítíð smb. §59, stk. 2, soleiðis, at hvør vaktartími verður umroknaður til 25% av vanligum arbeiðstíma.
**Stk. 3**. Um talið á vaktartímum innan fyri ein mánaða fer upp um 140, verður fyri teir eftirfylgjandi 70 tímarnar (vaktartímar) veitt serstøk samsýning, samsvarandi 50% av vanligari samsýning. Fyri vaktartímar umframt hesar verður veitt samsýning samsvarandi 100% av vanligari samsýning.
**Stk. 4.** Fyri tíðina, roknað frá boðsending, sum veruliga verður arbeitt undir tilkallivaktini, verður veitt viðurgjald sum fyri yvirarbeiði. Eisini kann arbeiðið verða afturbøtt við frítíð samb. §59, stk 2, tó soleiðis, at hvør boðsending verður at roknað fyri hvønn byrjaðan tíma ta tíðina, tað veruliga arbeiðið varar. Fyri fleiri boðsendingar innan fyri sama tíma kann bert verða latið endurgjald fyri yvirarbeiði fyir 1 tíma.
**Stk. 5**. Um protør/ambulansastarvsfólk, sum ikki er álagt at hava tilkallivakt, kortini verða boðsendir uttan fyri vanliga arbeiðstíð, verður veitt teimum viðurgjald, sum fyri yvirarbeiði samb. §1, stk. 2, tó fyri í mesta lagi 3 tímar. Fyri yvirarbeiði yvir 3 tímar verður veitt yvirarbeiðsviðurgjald fyri hvønn byrjaðan tíma. Um fleiri boðsendingar eru innan fyri 3 tímar, verður bert veitt yvirarbeiðsviðurgjald fyri 3 tímar. Um boðsent verður á einum frídegi, verður, um boðsendingin varir styttri enn 3 tímar, veitt viðurgjald sum nevnt omanfyri. Varir boðsendingin 3 tímar ella meir, verður hetta at rokna sum mistur frídagur samb. §. 59, stk. 3.
Stk. 6. Sjúkrahúsarbeiðarar, ið koma inn í tilkallivakt fyri ein annan, fáa vaktargjald samb**.** §60, stk. 2 í sáttmálanum + uppískoyti á 50% fyri 1., 2. og 3 tíma og 100% fyri 4. og fylgjandi tímum. Sama er galdandi um tímarnir verða afturbøttir við frítíð.
Sama mannagongd verður fylgd við avloysarum.

**§ 61 Vaktargjald.**
Portørum/ambulansustarvsfólk, sum arbeiða millum kl. 17.00 og 06.00, verður rindað viðurgjald uppá kr. 24.72 um tíman. Nevnda viðurgjald verður eisini at veita fyri yvirarbeiðstímar samb. §59 stk. 2, sum falla innan fyri nevndu klokkutímar.
**Stk. 2**. Fyri sundurbýtta tænastu, soleiðis at steðgur er í arbeiðstíðini uppá ein tíma ella meira, verður veitt viðurgjald, sum er kr. 7,03 um dagin. Sundurbýtt tænasta kann bert fara fram í tí í §1, stk. 1 og 2 nevnda tænastuhátti.
**Stk. 3.** Fyri hvørjar fullar 40 tímar í tænastu, sum eftir góðkendari vaktarskipan eru arbeiddir í tíðini frá kl. 17.00 til 06.00, verður veitt 3 tímar frí. Roknskapurin fyri hesa frítíð verður uppgjørdur mánaðarliga. Vunnin frítíð skal mótroknast í fullum arbeiðsfríum døgum, ið annars áttu at verið arbeiðsdagar.

**§ 62 Sektiónir v.m.**
Fyri at leggja lík í kistu verður veitt hvørjum luttakandi portøri/ambulansustarvsfólki eina samsýning, ið svarar til 3 normaltímalønir, roknað út frá lønarflokki 4. stig 2. Verður protørur/ambulansastarvsfólk tilkallaður uttanfyri vakt, verður umframt veitt viðurgjald fyri yvirarbeiði samsvarandi §59, stk. 2.

**Stk. 2.** Um portørur/ambulansastarvsfólk luttekur í sektiónum verður veitt samsýning, ið samsvarar 15 normaltímalønum. Hetta er galdandi fyri bæði hospitalssektiónir og rættsligar sektiónir. Í báðum førum verður tímalønin roknað út frá lønarflokki 4.stig 2.
**Stk. 3.** Um portørur/ambulansastarvsfólk av sjúkrahúsinum verða sendir í býin at heinta lík til sektiónir, leggja í kistu ella líknandi, verður veitt samsýning samsvarandi 4 normaltímalønum í lønarflokki 4.stig 2.

**§ 63 Flokkingar**

Inniportørar og assistentar lønarflokkur 2
Portørar við útbúgving sum viðgeri (ambulancebehandler) lønarflokkur 4
Vaktleiðari lønarflokkur 6
Yvirportørurin verður fluttur í stig 27
Tekniskur sjúkraflutningsleiðari verður fluttur í stig 28
Leiðandi vaktleiðarin verður fluttur í stig 31
Økisvaktleiðari stig 31
Varaleiðarin fyri sjúkraflutningstænastuna verður fluttur í stig 36
Leiðarin fyri sjúkraflutningstænastuna verður fluttur í stig 41

## 6. Kapittul. Gildi sáttmálans

**§ 64 Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2024. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2025. Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

**Í Havn tann 8. november 2025**

| **Fíggjarmálaráðið:** | **Starvsfelagið:** |
|---|---|
| Ruth Vang, sign | Súni Selfoss, sign./Anna Johannesen, sign. |
| Jan Mortensen, sign. | Birita F. Kjærbæk, sign. |
| | Borgný Mohr, sign. |
| | Hildigerð Djurhuus, sign. |
| | Hergeir Staksberg, sign. |

## Fylgiskjal um flokkan og lønir

### 1. Endamál

Endamálið við lønarskipanini er at tryggja eina rættvísa løn fyri øll størv, sum sáttmálin fatar um. Lønarskipanin skal tryggja, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.
Tá ið størv verða flokkað, verður dentur lagdur á, at tað er greitt samband millum løn og starvsinnihald, ábyrgd og hvar tey eru í bygnaðinum. Eisini skal verða tryggjað, at líknandi størv verða flokkað á sama hátt, óansæð á hvørjum stovni tey eru.

### 2. Alment um flokkanarfyrilit

Tá ið størv verða flokkað, verður hugt at teimum førleikakrøvum, starvsfólkið skal lúka fyri at kunna verða sett í starvið, og at arbeiðsinnihaldinum í starvinum. Viðmerkt skal verða, at tað er neyðuga útbúgvingin fyri at røkja starvið, sum verður mett og ikki útbúgvingin, starvsfólkið sjálvt hevur.
Størv verða ikki bara flokkað eftir útbúgving. Starvsinnihaldið hevur eisini týdning. Fyri so at siga øll størv eru ávísir karmar, sum arbeitt verður innanfyri. Munur er tó á, hvussu stórt rásarúmið er innanfyri settu karmarnar.
Tey fyrilit, ið vanliga verður hugt at, eru:
Hvar starvið er í bygnaðinum, eisini avgerðarheimildum
Lønini hjá nærmasta undir og yvirmanni
Vav og slag av arbeiðsleiðslu
Krøv til førleika, her uppi í útbúgving og royndir hjá tí, sum situr í starvinum

### 3. Útbúgvingarkrøv og arbeiðsroyndir

Størvini verða flokkað eftir, hvør útbúgving er neyðug fyri at kunna røkja starvið.

**Flokkur I**

Skúlagongd upp til 9. flokk.
Ongar arbeiðsroyndir verða kravdar.

**Flokkur II**

Skúlagongd miðnámskúli (student, HF, HH, HTX ella fiskivinnuskúla). Hevur starvsfólkið ikki útbúgvingina, verða kravd 5 ár í viðkomandi arbeiðsroyndum.

**Flokkur III**

Yrkisútbúgving ella miðnámsskúli umframt yvirbygnað millum hálvt og eitt ár, t.d. á merkonomstigi
2 – 3 ára arbeiðsroyndir

**Flokkur IV**

Yrkisútbúgving ella miðnámsskúli umframt yvirbygnað við meira enn enn einum ári og upp til tvey ár.
3 – 5 ára arbeiðsroyndir

**Flokkur V**

2 – 3 ára teoretisk útbúgving, aftaná miðnám- ella yrkisútbúgving. Serliga útsett størv kunnu verða flokkað í V. lønarflokki óheft av útbúgvingarkrøvum.

**Flokkur VI**
3 ár ella longri teoretiska útbúgving, aftaná miðnáms- ella yrkisútbúgving (bachelor)

**4. Starvsinnihald**

**Flokkur III**
Sjálvstøðugt arbeiði.
Kann gera tilmæli um hvørjar avgerðir verða tiknar.
Sjálvstøðug saksviðgerð á einum øki, har treyt er servitan
Skikkað arbeiði, sum krevur viðkomandi útbúgving og royndir
Taka sær av fjølbroyttum saksøki

**Flokkur IV og V**
Fjøltáttað, sjálvstøðugt arbeiði.
Starvsfólkið tilmælir ella tekur avgerð um hvussu ein nýggjur trupulleiki verður loystur.
Samskipandi uppgávur.
Taka sær av sjálvstøðugum, skikkaðum arbeiði, har treyt er viðkomandi útbúgving og royndir.
Lítlar leiðsluuppgávur
Sjálvstøðug saksviðgerð á øki, har treyt er stór servitan

**Flokkur VI**
Sera fjøltáttað og sjálvstøðugt arbeiði.
Starvsfólkið tekur sjálvt avgerðir um nýggjar trupulleikar og/ella er við til at áseta ella broyta yvirskipað endamál ella ráðleggingina á stovninum.

**Flokkur VII**
Serfrøðingur I – krevur arbeiðsroyndir, sum eru millum 3 og 5 ár.
Bachelorar
Fjølmiðlafólk
Sosialráðgevarar
Bókavørðir

**Miðallangar útbúgvar BA**

**Flokkur VIII**
Serfrøðingur II – krevur arbeiðsroyndir, sum eru meiri enn 5 ár.
Deildarleiðari I

Deildarleiðarar II – leiðir tungar deildir við starvsfólki í bólki V og VI, t.e. m.o. fjølmiðlafólk og sosialráðgevar – ganga stigini frá 34 til 40 í lønartalvuni.

**5. Serfrøðingar**
Trý sløg av serfrøðingastørvum verða skipað: Serfrøðingur I , II og III. Tá ið serfrøðingastørv verða skipað, eru formlig krøv um starvsaldur:

Fyri at verða útnevndur til serfrøðing I, skal starvsfólkið hava minst 3 ára starvsroyndir í relevantum starvi ella samsvarandi eftirútbúgving/dupultútbúgving. Serfrøðingur I er flokkaður í lønarflokki 7.
Fyri at verða útnevndur til serfrøðing II, skal starvsfólkið hava minst 5 ára starvsroyndir í relevantum starvi ella samsvarandi eftirútbúgving/dupultútbúgving. Serfrøðingur II er flokkaður í lønarflokki 8.
Fyri at verða útnevndur til serfrøðing III, skal starvsfólkið hava minst 7 ára starvsroyndir í relevantum starvi ella samsvarandi eftirútbúgving/dupultútbúgving. Serfrøðingur III gongur lønarstigini 34-40.
Umframt tey formligu krøvini, verður eisini kravt, at serfrøðingavitan er kravd fyri at røkja starvið og at starvsfólkið hevur servitan á høgum fakligum stigi.
Sum dømi um tættir, sum dentur verður lagdur á, tá ið serfrøðingastørv verða flokkað, kunnu verða nevnd:
Servitan á høgum fakligum stigi
Røkir serliga arbeiðsuppgávur á høgum førleikastigi
Ofta tvørgangandi uppgávur, t.d. leiðari fyri verkætlanum
Sjálvstøðuga fakliga leiðslu av einum ikki ótýðandi øki
Leiðsluligar uppgávur, m.a. ráðgeva leiðsluni og gera menningaruppgávur og frágreiðingar fyri leiðsluna
Ofta er beinleiðis starvsfólkaleiðsla bara ein smávegis partur av arbeiðinum.

**6. Miðallangar útbúgvingar**

Bachelorar ganga stigini: 17, 18, 19, 20, 21, 23, 25, 27

Flokkingin er ætlað útbúgvingar á støði við professiónsbachelor, ið hoyra til sáttmálaøkið hjá Starvsfelagnum.

Ein treyt fyri at verða umfataður av hesi flokking er somuleiðis, at starvsinnihaldið krevur nevndu útbúgvingar.

**7. Leiðsla.**

Deildarleiðarar eru í trimum flokkum:

Deildarleiðari 1, gongur lønarstigini 21-26
Deildarleiðari 2, gongur lønarstigini 27-33
Deildarleiðari 3, gongur lønarstigini 34-40, leiðir tungar deildir við starvsfólki í bólki VII ella BA-stiganum, t.e. m.o. fjølmiðlafólk og sosialráðgevar

Viðurskifti, ið hava týdning, tá ið støða skal verða tikin til, um eitt starv er leiðarastarv, eru:
- Innihaldið og ábyrgdarstigið í starvinum
- Ábygdarøkið
- Vavið og slagið av arbeiðsleiðslu
- Líknandi størv

**8. KT -leiðarastørv**
Leiðarastørvini verða flokkað sum KT -leiðari I og KT -leiðari II.

KT -leiðari I: Persónur, sum arbeiðir á KT -økinum á størri stovnum við fjøltáttaðum, broytiligum og tungum KT-uppgávum við nógvum brúkarum og kunnu í dagligdegnum hava dagliga leiðsluábyrgd av t.d. einum parti av uppgávunum á stovninum. Munurin millum KT-leiðara I og KT -leiðara II er ein spurningur um yvirorðnaða leiðsluábyrgd.
KT-leiðari II: Persónur, sum hevur yvirorðnaða leiðsluábyrgd á KT-økinum og KT yvirhøvur, sum er settur á størri stovnum við fjøltáttaðum, broytiligum og tungum KT-uppgávum við nógvum brúkarum. T.d. T&S, gjaldstovan, LV, Almannastovan, Landssjúkrahúsið, Postverkið og SL. Við leiðsluábyrgd verður hugsað um t.d. fíggjarliga ábyrgd, val og evning av KT-strategi, -politikki, menning, rakstur og viðlíkahald av KT-skipanum og leiðslu av KT-verkætlanum.
Størvini eru flokkað soleiðis:
KT-leiðari I lønarflokkur VII + 2 stig,
stig 19 – 25
KT-leiðari II lønarflokkur VIII + 2 stig,
stig 23 – 28.

Mánaðarliga reiðuviðbót fyri persónar ið ofta verða noyddir at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð.
KT-leiðari I  3.000,-
KT-leiðari II 3.300,-
Reiðuviðbótin dekkar 35 tímar ársfjórðingin.
Fyri drúgt álagt meirarbeiði verður eftir umsókn veitt yvirtíð.
Persónar uttan reiðuviðbót og meirarbeiðsskyldu fáa vanliga yvirtíð.

## Rúmligi arbeiðsmarknaðurin.

Almenni arbeiðsgevarin vil vísa vælvild og rúm mótvegis fólki við skerdum førleikum, starvsfólki, sum gerast sjúk meðan tey eru í arbeiði, ella koma út fyri vanlukkum, so hesi kunnu hava ella varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Hetta kann m.a. gerast so at hesir starvsfólkar fáa serliga tillagaðar setanartreytir. Við støði í vanligu ásetingunum í sáttmálanum eigur sostatt at bera til at lata arbeiði verða gjørt undir serligum treytum.

**Lønartalva og flokkingaravtala:**
Sáttmálapartarnir fara undir at endurskoða lønartalvuna og flokkingaravtaluna. Hetta arbeiðið skal vera liðugt 1. juni 2025.
Broytingar, ið bera ein kostnað við sær, verða avtalaðar partanna millum.

**Sjúkraflutningstænastan**
Í sáttmálaskeiðnum endurskoða sáttmálapartarnir arbeiðstíðaravtaluna. Hetta arbeiðið skal vera liðugt 1. mai 2025.
Um partarnir eru samdir um tað, kunnu broytingar, ið ikki føra við sær ein kostnað, iverksetast í sáttmálaskeiðinum. Broytingar, ið bera ein kostnað við sær, kunnu setast í verk 1. oktober 2025.

**Kringvarp Føroya**
Í sáttmálaskeiðinum viðgera Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið serstøk viðurskifti og sáttmálaásetingar fyri starvsfólk í Kringvarpi Føroya. Hetta við tí fyri eyga at kunna íverkseta møguligar broytingar í samband við komandi samráðingar. Hetta arbeiðið skal verða liðugt 1. juli 2025.
Um partarnir eru samdir um tað, kunnu broytingar, ið ikki føra við sær ein kostnað, tó íverksetast í sáttmálaskeiðnum.

**Protokollat um felags evnisdag um førleikamenning**

Sáttmálapartarnir eru samdir um at skipa fyri felags evnisdegi, har ljós verður varpað á tøkniligu frambrotini, sum Talgilding Føroya hevur staðið fyri við menningini av talgildum tænastum. Harundir avleiðingarnar tøkniliga menningin hevur havt á arbeiðið hjá alment og kommunalt settum starvsfólkum.

Ljós skal eisini varpast á møguleikan hjá arbeiðsgevarum at seta í verk førleikamenning, m.a. tá starvsfólk hava tørv á upplæring og dagføring fyri frameftir at umsita tøkniligu skipanirnar o.a.

Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum.

**1. Inngangur**

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

*Førleikamenning*

*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum*

*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum*

*Javnstøða*

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá landinum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**

Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeið, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsis stovnar mennast.

Partarnir eru tí samdir um, at:

miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.

hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.

endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.

Starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.

Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á landsins stovnunum.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum**

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.

Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

*Niðursett tíð*

Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:

a) vera fylt 60 ár

b) hava starvast hjá landinum seinastu 10 árini

c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

*Lægri starv*
Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.
Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.
Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

*Niðursett tíð orsaka av sparingum*
Gera sparingar, at starvsfólk verða sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:

a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár
b. starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini
c. arbeisðtíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum**
Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.
Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja alment virksemi**
Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

## Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins

**§ 1. Inngangur**
Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.

*Stk. 2.* Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá landinum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**
Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3. Endamál**
Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4. Menningarmál**
Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum stovnum hjá landinum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka stovninum.

*Stk. 2.* Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.

*Stk 3.* Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.

*Stk. 4.* Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

**§ 5. Almennur førleiki**
Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaki stovnurin og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

**§ 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd**
Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá stovninum og tørvinum á strategiskari førleikamenning

- áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á stovninum
- samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar

- áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar

*Stk. 2.* Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á stovninum.

*Stk. 3*. Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um stovnurin hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

**§ 7. Fylgibólkur**
Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

**§ 8. At seta í gildi og siga upp**
Henda avtala verður sett í gildi tann 1. oktober 2003. Avtalan kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða ávaring til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1. oktoberr 2005.

## Ískoytisavtala 12. Oktober 2015.

**Førleikamenning**

Sáttmálapartarnir eru samdir um, at tað er alneyðugt, at ásetingin í sáttmálanum okkara millum um strategiska førleikamenning skal fáast at virka á øllum stovnum landsins.

Tað er av alstórum týdningi fyri menningina av almennu fyrisitingini og fyri at verða ein áhugaverdur arbeiðsmarknaður, at stovnarnir regluliga og áhaldandi stinga út í kortið, leggja ætlanir og førleikamenna starvsfólk samsvarandi. Hetta fyri at kunna taka við nýggjum avbjóðingum, so tænastustøðið alsamt verður betrað.

Regluliga eftirmeta sáttmálapartarnir, um ásetingarnar um strategiska førleikamenning í sáttmálanum verða fylgdar, í minsta lagi annað hvørt ár.

Á arbeiðsplássinum eru álitisfólkini bindiliðið millum leiðslu og starvsfólk og hava regluliga uppfylging við leiðsluna, um at strategiska førleikamenningin virkar eftir æltan.

## Avtala um serstaka fríviku

**Øki**
**§ 1**. Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.
Stk. 2. Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir.

**Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin**
**§ 2.** Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina sertaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnar verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.
Stk. 2. Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

**§ 3.** Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda frívikuna.
Stk. 2 Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

**§ 4**. Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstaka frívikan ella parturr av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

**§ 5**. Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.
Stk. 2. Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.
Stk. 3. Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.

**§ 6**. Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7.

**§ 7**. Útgjaldið fyri serstakan frídag er ½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.
Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.

**Gildiskoma og skiftisreglur**
**§ 8.** Avtalan hevur gildi frá 1. oktober 2003.

**§ 9**. Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 1. apríl 2003 til 31. mars 2004, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2004. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

**§ 10**. Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004.

## Eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi

Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið (hereftir partarnir) staðfesta, at eitt gott arbeiðsumhvørvi og eitt álitisríkt samstarv er avgerandi fyri, at starvsfólk og leiðsla trívast. Hetta er tí eisini avgerandi fyri góðskuna tá arbeiðsuppgávur verða loystar, og fyri produktivitetin á arbeiðsplássinum. Partarnir vilja í samstarvi seta fokus á, at stimbra eitt gott arbeiðsumhvørvi – herundir eisini sálarliga arbeiðsumhvørvið.

Felags eyðkenni fyri arbeiðspláss við góðum arbeiðsumhvørvi er, at fylgjandi eyðkenni ganga aftur: Álit, sínámillum virðing og viðurkenning.

Fyritreytin fyri hesum er eitt gott samstarv og leypandi samskifti millum leiðslu og starvsfólk, her ímillum álitisfólk og trygdarumboð.  Eisini er fyritreytin ein góð felags uppfatan av, hvør kósin er, hvørjar kjarnu arbeiðsuppgávurnar eru, innan hvørjar karmar hesar skulu loysast, og fatan av hvørjar væntanirnar eru til, hvussu arbeiðsuppgávurnar skulu loysast.

Fyri at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi, er týðandi, at øll á arbeiðsplássinum taka ábyrgd. Leiðslan, samstarvsnevnd, álitisfólk og starvsfólk mugu tí taka felags ábyrgd – bæði fyri, at tað gongur væl, og tá møguligir trupulleikar eru og skulu loysast.

Er arbeiðsumhvørvið ikki nóg gott – eitt nú sálarliga – kann hetta elva til størri sjúkrafráveru, mistrivna, at fólk fara úr starvi, og at arbeiðsuppgávur ikki verða loystar so væl sum møguligt.

Fyri at fyribyrgja hesum, hevur tað stóran týdning leypandi at halda eyga við arbeiðsumhvørvinum, og at taka fatur í og loysa trupulleikar, um tekin er um, at trupulleikar eru við arbeiðsumhvørvinum. Fyri at kunna arbeiða málrættað við at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi krevst vitan um tey viðurskifti, sum ítøkiliga kunnu hava jaligan ella neiligan týdning fyri arbeiðsumhvørvið. Partarnir eru samdir um, at stuðla átøkum, ið fremja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi.

Partarnir ásanna, at munur er á ymiskum arbeiðsplássum, arbeiðsuppgávum og starvsfólkum. Átøk mugu tí taka útgangsstøði í eini felags fatan av, at tey átøk, ið gera størstan mun eru tey, ið taka útgangsstøði í umstøðunum á ítøkiligu arbeiðsplássunum.

Fíggjarmálaráðið fer at kunna leiðslur og starvsfólk á landsins arbeiðsplássum um stóra týdningin av, at leiðsla og starvsfólk í felag tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi. Eisini fer Fíggjarmálaráðið í sáttmálatíðarskeiðnum at gera vegleiðing um, hvussu leiðslur og starvsfólk skulu fyrihalda seg, um starvsfólk eru strongd. Hartil fer Fíggjarmálaráðið í næstum at seta í verk vegleiðing um sjúkrafráveru.  Vegleiðingarnar verða gjørdar í samráð við fakfeløgini.

Starvsfelagið fer í sáttmálatíðarskeiðnum at bjóða álitisfólkunum skeið í, hvussu tey best kunnu viðvirka til, at fremja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi saman við starvsfólkum og leiðslu.

**Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið**

Partarnir í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og at seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingnum niðanfyri.

Stk. 2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum.

Stk. 3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

Stk. 4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er Semingsstovnurin komin uppí, ella er Semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.

Stk. 5. Hendan avtalan kann verða søgd upp saman við sáttmálanum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Avtalan kann tó bara verða ógildað við nýggjari avtalu.

Stk. 6. Hendan avtalan fær gildi frá 1. november í 2015.

*Á Argjum tann 12. oktober í 2015*

| | |
|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | Starvsfelagið |

**Avtala um neyðtilbúgving í samband við arbeiðssteðg.**
Partarnir eru samdir um at gera eina avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg, sum tryggjar at lív, heilsa og týðandi samfelagslig virði ikki verða sett í vanda.

Avtalan skal lýsa, hvørji størv eru neyðug at manna fyri at hava eina nøktandi tilbúgving og eisini lýsa ein skipan, sum kann loysa møguligar ósemjur um undantøk.

Hendan avtala (fylgiskjal 1) verður at seta í gildi 1. apríl 2025.

**Fylgiskjal 1 til avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg:**

Fylgjandi verður lagt aftur at stk. 3 í avtaluni um fráboðanarform og fráboðanarfreist:
Partarnir eru samdir um, at ein arbeiðssteðgur í ongum førum má seta lív og heilsu borgarans í vanda, og somuleiðis eigur ein arbeiðssteðgur heldur ikki at føra til, at stór samfelagslig virði fara fyri skeyti.
Tá arbeiðssteðgur kann seta lív, heilsu og samfelagsvirði í vanda, eiga nøkur starvsfólk tí at verða undantikin arbeiðssteðgi.

1. Leiðarar 3 og leiðarar flokkaðir omanfyri hetta kunnu ikki fara í arbeiðssteðg. Ítøkilig meting verður gjørd fyri leiðarar 1 & 2.
2. Í mun til onnur størv, metir leiðslan um og ger av í samráð við álitisfólkið, hvussu nógvum starvsfólki tørvur er á, sbr. nr. 3niðanfyri. Tá sáttmálin millum partarnar er uppsagdur lata stovnsleiðslur og kommunur Fíggjarmálaráðnum/Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fylgiskjal A, har ásett verður, hvørji starvsfólk verða undantikin møguligum arbeiðssteðgi. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið senda skjølini víðari til Starvsfelagið, og í seinasta lagi 1 mánað innan sáttmálin gongur út, skal semja vera millum partarnar um fylgiskjal A.
3. Starvsfólk, ið eru undantikin arbeiðssteðgi, eiga bert at átaka sær tær neyðugu uppgávurnar. Endamálið er bert at forða fyri, at vandi ikki stendst fyri lívi, heilsu ella tapi av stórum samfelagsligum virðum. Starvsfólk mugu sostatt ikki átaka sær aðrar uppgávur.
4. Viðkomandi limir hjá Starvsfelagnum, sum fáa arbeiðsboð frá leiðsluni, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálanum, sum var galdandi, áðrenn arbeiðssteðgurin var lýstur.
5. Er Starvsfelagið ikki samt við eini avgerð hjá leiðsluni sambært skjali A, kann felagið leggja málið fyri eina nevnd, sum ger av, um undantakið er neyðugt fyri at tryggja, at lív og heilsa borgarans ikki verða sett í vanda, ella fyri at tryggja, at stór samfelagslig virði ikki fara fyri skeyti.
6. Nevndin verður mannað við trimum limum. Fíggjarmálaráðið / Kommunala Arbeiðsgevarafelagið velja ein lim, og Starvsfelagið velur ein lim. Hesir báðir limirnir velja síðani forfólkið. Forfólkið skal hava viðkomandi fakligt innlit og vera óheft. Av tí at Starvsfelagið umboðar nógvar ymiskar fakbólkar er neyðugt, at forfólkið leitar sær fakliga ráðgeving, alt eftir hvørji fakøki skulu viðgerast.

7. Til limirnir hava valt eitt forfólk sambært nr. 4, er forfólkið útnevnt av sorinskrivarinum. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar, eftir at áheitan sambært nr. 4 er komin frá Starvsfelagnum. Verður nevndin ikki samd, tekur forfólkið avgerð.
8. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna hvør sínum limi í nevndini. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna formanninum.
9. Ein avgerð sambært nr. 3 kann eftir arbeiðssteðgin leggjast fyri Fasta Gerðarættin.

## Tal av álitisfólkum á almennu stovnunum:

| | |
|---|---|
| Landssjúkrahúsið | 5 |
| TAKS | 4 |
| Almannaverkið | 4 |
| Strandferðslan | 3 |
| Kringvarpið | 3 |
| Vørn | 3 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 2 |
| Havstovan | 2 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 2 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús | 2 |
| Landsverk | 2 |
| Rúsdrekkasøla Landsins | 2 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 2 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Akstovan | 1 |
| Almannaráðið | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Bústaðir | 1 |
| Dugni | 1 |
| Føroya Gjaldstova | 1 |
| Glasir | 1 |
| Hagstova Føroya | 1 |
| Heilsumálaráðið | 1 |
| Heilsutrygd | 1 |
| Jarðfeingi | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 1 |
| Løgtingið | 1 |
| Mentamálaráðið | 1 |
| Nám og Próvstovan | 1 |
| Sernámsdepilin/Skúlin á Trøðni | 1 |
| Sjóvunnustýrið | 1 |
| Studni | 1 |
| Tjóðsavnið | 1 |
| Føroya Landsbókasavn | 1 |
| Tjóðskjalasavnið | 1 |
| Tjaldurs Apotek | 1 |
| Vinnustovnurin | 1 |